# EYSTUROYAR DANSIFELAG



Tann 29.august 2018

**Skráin veturin 2018-2019.**

Vit halda til í Hæddini, Saltangará, vanliga **fríggjakvøld** kl. 21.00 til út ímóti midnátt. Vit kvøða fyrst og hava so ein steðg til kaffi/te og prát, og so verður aftur kvøðið.

Her er skráin, har tað klassiska er væl umboða, umframt okkurt nýtt, men vit ætla at kvøða nógv meir enn hetta. Og ikki at forgloyma tað, sum var á skránni í fjør – og slíkt, ið fólk hava hug at kvøða.

Teir flestu tekstirnir eru at finna í kvæðabók okkara á **eystdans.dk** og í kvæðabókunum ANT (Fær. Anthologi), DKF (Danske kæmpe- og folkeviser), GSF (Grør so fagurt), NK 1&2 (Nýggja kvæðabókin) og SF (Stígum fast).

Vertir hava vit sett uttan at spyrja; annars taka øll eina hond í – eisini mannfólkið.

19/10-18 Hin føroyski dansurin, NK1. Ivan.
Leirvíks Páll, GSF, Kathrina. Vertir: Nevndin.

26/10 Brynhildartáttur, til 25. ør, GSF, Kristian.
Snekken ligger på landet, DKF, Sjúrður Vertir: Jónhild og Erla.

02/11 **Vit kvøða brúðarvísur.** Bispur kemur á vitjan, og hann fer at hugleiða um brúðardans.
Harra Pætur og Elinborg, Jóna; Kong Hans, J. Carl; Brúðarvísan (IPG), Karstin; Fisken, Kristian;
Leivs kvæði, Hans. Vertir: Marjun og Andrea.

09/11 **Barnadansur kl. 20-21**, har vit kvøða slíkt, sum børn duga; í steðginum sodavatn o.t.
Sverra ríma, Songbók F. fólks, Tóta og Sverri.
Brynhildartáttur, til 25 ør., Kristian.
Jómsvíkingar, SF, Sámal P. Vertir: Beinta og Pálin.

16/11 **Táttakvøld**, har vit kvøða stutt og lætt. Nógv ymisk skipa. Meir um hetta seinni.
Vertir: Anna Maria og Kathrina.

23/11 Dronning Dagmar ligger i Ribe sjug, til 22. ø. Kristian.
Stærke Tidrik, DKF, Leivur.
Skrímsla, GSF; Hans. Vertir: Bilha og Aslaug

30/11 Brynhildartáttur, 26. til 61. ø. Kristian.
Frísakvæði hjá Pól F, Jóannes greiðir frá og skipar. Vertir: Hanna og Súsanna.

| | | |
|---|---|---|
| 07/12 | **Strandakvøld**, í Pensionistahúsinum, Heygsstøð 3 á Strondum.<br>Strandatáttur, Joen Carl.<br>Ungersvend bad sin flikke, Jóna.<br>Harra Pætur og Elinborg, Elin. | Vertir: Kára og tær á Strondum. |
| 04/01-2019. | Leirvíks Páll. GSF, Kathrina<br>Sniálvstáttur, Anfinnur. | Vertir: Sunneva og Elsa. |
| 11/01 | **Glyvr'Hanusarhús**, Norðragøtu.<br>Harpuríma, GSF; Anna og Sanna.<br>Vaagen, STF; Anfinnur.<br>Runsivalsstríðið, til 46. ørindi; Leivur og Karstin. | Vertir: Sanna, Anna og tær í G. |
| 18/01 | **Aðalfundur** kl. 20.30 - 21.30; skrá eftir lógini.<br>Norska løva, SF, Kathrina.<br>Hafburd konge, DKF, Joen Carl. | Vertir: Simona og Turid. |
| 25/01 | Vit fara til **Haraldssunds**. Felagið leigar buss: úr Hæddini kl. 21.15 – steðga á vanligum støðum; til hús kl. 02.00 ella kl. 02.30, um dansurin er góður. Gj. atgongumerki í Haraldssundi.<br>Kópakvæði, Karstin. | |
| 01/02 | **Blíðskaparkvøld** – har okkurt felag verður boðið. Meir um tað seinni.<br>Jákup á Møn, GSF, Joen Carl. | |
| 08/02 | **Barnadansur kl. 20-21**, har vit kvøða slíkt, sum børn duga; í steðginum sodavatn og twix.<br>Sverra ríma, Tóta og Sverri.<br>Dronning Dagmar ligger i Ribe sjug, Kristian. | Vertir: Bjørg og Tóta. |
| 15/2 | **Hugnakvøld**, kl. 20.00. Meir seinni. | |
| 22/2 | Vit minna okkum á ein góðan og langan dansivetur. | Vertir: Marita og Jens. |

**Nýggjárskvøld** og **fastalávints mánakv.** er opið frá 20.30 til u.l. midnátt, og vaksin gjalda kr. 50,-

Gøtufólk skipa fyri **barnadansi** í Losjuni í Gøtu mánakvøld kl. 19-20. Sí **Facebook**: Føroyskur dansur fyri børn.

K**unning** fáa okkara limir pr. e-post, á eystdans.dk og **Eysturoyar dansifelag á Facebook** (opin bólkur).

**Limagjaldið fyri 2018,** kr. 100,- verða limirnir bidnir um at flyta í **Bank Nordik, konto 6460 407 961 4**
- helst ikki seinni enn 1.nov. 2018. Viðmerking við gjaldi: egið navn/nøvn. Einki annað!